# Birgar við bókasølu á ól




*Við bókunum um Havnina hevur Birgar Johannesen sett søguna um høvuðsstaðin í system*

Á ólavsøku verður aftur bókasøla í Hjalmar Jacobsens Bókahandli í miðbýnum í Havn, sum læt aftur herfyri. Hesaferð er tað nýggja havnarbókin hjá Birgari Johannessen, sum verður til keyps har

Í staðin fyri at selja nógvar ymiskar bøkur verða tað nógv eintøk av somu bók í hølunum, har Hjalmar Jacobsens Bókahandil hevur hildið til í mong ár.

Einasta bókin sum verður seld har á ólavsøku er nevniliga bókin "Havnin – fólk og yrki 1940-1969" hjá Birgari Johannessen. Talan er um annað bind og framhald av bókini "Havnin – fólk og yrki 1900-1939", sum kom út í fjør og gjørdist metseljari.

Birgar Johannesen sigur, at hann er sera fegin um hendan møguleikan, hann hevur fingið, at kunna bjóða bókina fram til alt Føroya fólk á ólavsøku, tá eisini nógvir útsetar eru heima.

Nýggja bókin er eins væl móttikin og tann fyrra, sum kom í fjør og bleiv prentað í 5.000 eintøkum. Nýggja bókin rakar ein enn størri lesaraskara við tað at bæði tey eldru og tey tilkomnu minnast hetta tíðarskeiði. Ikki minst tey tiltiknu 60-ini sum var ein tann største broytingartíðin í 20. øld.

Bøkurnar hjá Birgari Johannesen eru nakað heilt serligt, sum havnarborgarar kunnu vera stoltir av. Spurningurin er, um tað í heila tikið finnst nakað so nágreiniligt savn yvir nakran annan bý í heiminum.

## Grípur inn í alla mentanina

Birgar Johannesen hevur sett søguna um høvuðsstaðin í system. Bókin grípur inn í alla mentanina hjá býnum og er sera umfatandi. Vit kunnu til dømis nevna konfirmantar, kirkjur og samkomur, nógvar ymiskar stovnar, handlar, alt slag av flutningi, skúlaverkið, heilsuverkið, ítróttar- og frítíðarfeløg, eins og tónleik og undirhald.

Justinus Leivsson Eidesgaard skrivar millum annað í forðorðunum til nýggju bókina, at tað er bara telefonbókin, sum hevur fleiri nøvn enn hendan